# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*4. juli fingu Kirstin og Høgni Hammer ein son á Herlev Amtssygehus. Hann var 55 cm langur og vigaði 5300 g. Hann eitur Levi Høgnason Hammer.*

6. juli fingu Sólmai Danielsen og Birgir Ørn Gunnarson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3850 gr.

9. juli fingu Tóna í Niðristovu og Ernst Olsen, Tórshavn, tvíburðar, dóttur og son. Gentan var 52 cm long og vigaði 2800 gr, drongurin var 52 cm langur og vigaði 2700 gr.

9. juli fingu Sonja og Esmar Simonsen, Søldarfirði, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 2275 gr.

10. juli fingu Gemma og Jógvan Sofus Mørkøre, Eiði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2800 gr.

11. juli fingu Tina og Petur A. Johannesen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

13. juli fingu Sunnrid Poulsen og Ragnar H. Thomsen, Norðskála, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4950 gr.

14. juli fingu Maiken Streymoy og Jákup Martin á Válinum, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3310 gr.

14. juli fingu Kristina Nónklett Hansen og Jógvan Martin Hansen, Glyvrum, ein son. Hann eitur Filip. Hann var 56 cm langur og vigaði 4750 gr.

14. juli fingu Annika Petersen og Bjarni Rubeksen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3150 gr.

16. juli fingu Gunnbjørg Andreasdóttir, Bø, og Andras Andreasen, Norðradali, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3640 gr.

16. juli fingu Katrina Guttesen og Arthur Poulsen, Esbjerg, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4800 gr.

## Dagurin

**19. juli. Justa,** deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hon og systirin Rufina beindu fyri skurðgudamyndini Salambo í Sevilla í Spaniu. Tær vórðu báðar píndar og tiknar av døgum. Navnið merkir *tann rættvísa.*
**20. juli Elias.** Dagurin verður hildin til minnis um profetin Elias, sum Kongabøkurnar í Gamla testamenti siga frá. Í Føroyum hevur hann fingið navnið Líggjas. Bíbilskt navn, ið merkir *Jahve er Guð mín.*
**21. juli. Evenus.** Grikska navnið Evenus er ikki at finna í halgimannatali, men er onkursvegna komið upp í álmanakkarnar frá 1727.

## Andlát

12. juli
Rólant Vaag Høgnesen Klaksvík, búsitandi í Herlev, 75 ár

14. juli
Otto Christiansen, 82 ár.
Urbana Poulsen Klaksvík, búsitandi á Tvøroyri, 87 ár
Ella Jacobsen Morkranes, búsitandi í Tórshavn, 90 ár

17. juli
Martin Joen Jacobsen Sandavágur, 64 ár

# Kvik-Køkar í nýggj hølir




*Hans Michael Hansen framman fyri Kvik-Køkum við Hoyvíksvegin*

Í dag, 19. juli, flytir køkshandlin, Kvik-Køkar, av Heykavegnum, har teir áður hava hildið til, yvir í bygningin hjá Bakaríðnum hjá Gunnleivi við Hoyvíksvegin í Havn. Hans Michael Hansen, sum eigur og rekur Kvik-Køkar, sigur at teir nú fáa yvir hundrað fermetrar meira at ráða yvir. Nýggi handilin er 250 fermetrar. Hans Michael yvirtók Kvik-Køkar fyri trimum árum síðan. Nú kunnu fólk sjálvi gera av, hvussu nógv tey vilja gjalda fyri køkarnar. Um tey sjálvi heinta køkin og seta hann saman, eru nógvir pengar at spara, sigur Hans Michael. Í nýggju hølunum er eisini ein sølframsýning av málningum hjá 25 ára gamla Kristian Tórsson úr Klaksvík. Móttøka verður í handlinum frá kl. 10-14, har kaffi og køkur eru tey vaksnu, og okkurt eisini er til børnini.

# Musikkskúlin á tónleikastevnu

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum frá 25. til 31. juni 2003 luttóku næmingar úr Tórshavnar Musikkskúla á norðurlendskari tónleikastevnu hjá Nordisk Musikpædagogisk Union (NMPU) í Íslandi.

Talan var um tveir bólkar, eitt harmoniorkestur og ein guitarbólkur. Harmoniorkestrið, undir leiðslu av Peder Riis-Jensen, varð mannað av børnum í aldrinum frá 10 til 15 ár, meðan guitarbólkurin, ið Ólavur Jakobsen og Bo Isholm stjórnaðu, varð mannaður við framkomnum næmingum.

Bólkarnir høvdu konsertir saman og hvør sær. Ein felags konsert var í stásiliga tónlistarskúlanum í Kópavági. Konsertin varð stórliga fagnað. Eisini luttók guitarbólkurin í eini felags norðurlendskari tónleikaguðstænastu í Digraneskirkjuni, har ið bólkar úr øllum norðurlondum settu dám á. Harmoniorkestrið fekk eisini høvi at framføra í størstu sølumiðstøðini í Íslandi, Smáralind kallað.

Teir ungu tónleikararnir vitjaðu eisini føroyska sjómansheimið í Reykjavík, Ørkina, har framførsla var. Útferðir vóru eisini á skránni ymsastaðni á Reykjavíkarleiðini.

Umframt hesar framførslurnar luttóku øll tey føroysku børnini í einum megnartiltaki, saman við eini 200 øðrum børnum og ungum úr norðurlondum. Verkið ið framført varð, var til á staðnum, soleiðis at skilja, at øll vóru við til at gera tónleikin. Til tónleikin var so dansibólkar settir at gera dans og riggaði hetta sera væl.

Øll stevnan endaði við stórari konsert, har ið verkið varð framført. Eini 250 ungir tónleikarar, kór og dansarar á palli: Eitt ordans brak.

Paul Griffiths, ið dagliga er lærari á lærda tónlistarskúlanum Guildhall School of Music í London, stjórnaði hesi framførslu, har ið børn og ung úr norðurlondum í felagsskapi skaptu og framførdu hetta stórfingna verk.

Ferðalagið taldi um eini 70 fólk og var hetta eitt sera kostnaðarmikið tiltak. Foreldrini, børnini og lærrarnir høvdu ymisk tiltøk fyri at fíggja ferðina og varð eisini latin dyggur stuðul frá stovnum og fyritøkum. Hetta eru vit sera takksom fyri.

Hesi stuðlaðu ferðini:

Atlantic Airways, Tórshavnar Býráð, Nordisk Ministerråd (BUK), Mentanargrunnurin, Mentamálaráðið, Sonning-Fonden, Den Letterstedske Fond, Fitur, Føroya Sparikassi, Tórshavnar Musikkskúli, Napoleon Nólsoy, Hotel Føroyar, JB Trade, Argja Skúli, Keypssamtøkan, SMS, Kemilux, Vesturkirkjan, Merlot, Pizza 67, Damfar, Skálabúðin, Hjá Gunleivi, Niels L. Arge, Simme, Restorffs Bryggjarí, Frans Restorff, Litaval, Føroya Bjór, Wrangler, TIGI, Skálkur, Gallan, Hjalmar Jacobsen, Miklagarður, Maria Poulsen, Havnar Bio, Hjá Fróða, Hotel Hafnia, Nantong, Balslev og Gullhornið.

# Málningaframsýning í Saltangará

LIST
*Tíðindaskriv*

Í býráðssalinum hjá Runavíkar Kommunu hava málningar hingið síðani Eystanstevnan var hildin í ár. Listakvinnurnar, sum sýna fram eru Anja Hentze og Karolina Danielsen.

Hetta er háárstíð í ferðavinnuni og nógv fólk vitja býin. Í sambandi við at kunningarstovan í Saltangará og býráðssalurin eru í sama bygningi, er avgjørt at lata býráðssalin og framsýningina upp fyri ferðafólki.

Framsýningin er opin mánadag til fríggjadag frá klokkan 9 til 16. Seinasti dagur er 31. juli.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hilmar Bech 70 ár



Kring um í landinum man hann vera best kendur sum politikari, í Porkeri kanska uppaftur betur kendur sum lærari. Hilmar er føddur í Porkeri. Mamman, Jóhanna Jensen, var av Strondum og pápin, Jacob M. Bech, var porkeningur.

Hilmar Bech var ein av teimum 20 løgtingsmonnunum í 20. øld, sum gjørdust løgtingsformenn. Hann varð valdur á Ting fyri Javnaðarflokkin í Suðuroy í 1970, eftir at tingmaður floksins í Porkeri í mong ár, Jóhan Danbjørg, var deyður. Hilmar var tingmaður út í eitt til 1984, og seinni hevur hann onkuntíð verið varamaður. Hann var løgtingsformaður í valskeiðinum 1979-80.

Hann hevði eisini onnur álitisstørv. Var í stýrinum fyri ALV 1972-2000, í nevndini fyri Tryggingarsambandið 1985-95, í stýrinum fyri Húsalánsgrunnin í 6 ár og í stýrinum fyri 60-miljóna grunnin frá 1986. Eisini var hann bygdarráðslimur í Porkeri 1962-66. Hann varð valdur í Kirkjuráðið í Porkeri í 1973 og varð formaður í 1990.

Hilmar tók lærarapróg v í Haslev í 1958. So var hann lærari í Vági í eitt ár. Hann var lærari í Porkeri1959-99, fyrstilærari frá 1967.

Hann giftist við Kristinu Samuelsen úr Tjørnuvík. Tey fingu børnini Jóhannu og Dann, og abbabørnini eru seks í tali.

Frítíðarítriv hjá Hilmari er at fara í fjørðin. Eisini prátar hann nógv við fólk og skrivar niður mangt og hvat um hendingar fyrr í tíðini og hvussu fólk livdu fyrr.

## Keld Ellevang deyður



Hósdagin 17. juli andaðist Keld Ellevang í Ålborg, 69 ára gamal. Í Havn munnu mong kenna hann frá tíðina, tá hann starvaðist sum prentari í býnum.

Hann var giftur við Jonnu, elstu dóttir Helgu og Jóhan Godtfred í Vági. Tey búsettust í Husum í Keypmannahavn og fingu børnini Vinnie, Frank og Boga.

Keld varð føddur í Keypmannahavn og lærdi til typograf. Í mong ár starvaðist hann á Politiken, og Jonna hevði starv í danska postverkinum. Í 1975 fluttu tey til Føroya. Keld arbeiddi sum prentari á Dagblaðnum, 14. September og Sosialinum, og eitt skifti hevði hann prentsmiðju saman við einum øðrum. Eisini í Føroyum arbeiddi Jonna á Postverkinum.

Fyri 12 árum síðani fluttu tey aftur til Danmarkar og búsettust í Ålborg. Tey seinastu árini hevur Keld ikki livað væl.



## Sylverius og Marius Jacobsen 50 ár

Í dag, leygardagin 19. juli verða tvíburabrøðurnir Sylverius Jacobsen á Skála og Marius Jacobsen í Leirvík 50 ár. Teir eru leirvíkingar, synir hjá Malenu, vanliga nevnd Malla, f. Øregaard, og Suna Jacobsen, bæði úr Leirvík.

Sylverius er føddur í Klaksvík seks tímar eftir at eineggjaði tvíburabróðurin, Marius, var føddur í Leirvík. Eftir at Marius var føddur, bleiv mamman í skundi flutt við útróðrarbátinum Gulakletti til sjúkrahúsið í Klaksvík, har Sylverius er borin í heim. Hetta var undir læknastríðnum í Klaksvík.

Sylverius fór í læru á Skála Skipasmiðju 1. mars 1970, og hevur hann arbeitt har síðan tá. Hann hevur búð á Skála síðan 1973 og er í dag smiðjumeistari á Skála Skipasmiðju. Hann er giftur við Sannu, fødd Berg, av Skála. Tey eiga tríggjar døtur: Paula, Sunfríð og Elisabeth, eisini eiga tey 3 ommu og abbabørn. Sylverius hevur verið limur í Javnað-arflokkinum frá ungum av, og hevur hann verið uppstillaður fyri flokkin í Eysturoynni. Hann er formaður fyri Meinigheitsstýrið á Skála, og brúkar hann stóran part av síni frítíð har.

Marius lærdi eisini á Skála Skipasmiðju, síðan gekk hann á maskinskúla og fekk maskinistprógv. Hann hevur arbeitt á sildamjølsverksmiðjuni í Fuglafirði og í smiðjuni hjá Br. Petersen í Fuglafirði. Eina tíð var hann arbeiðsformaður á flakavirkinum Frost í Leirvík. Í dag arbeiðir hann á brennistøðini hjá IRF á Hagaleiti í Leirvík, har hevur hann verið við frá byrjan. Marius er giftur við Annu, f. Thomsen, av Skála. Tey búgva í Leirvík og eiga trý børn: Malan, Jørgin og Petur Súni. Eisini eiga tey eina ommu- og abbadóttir. Marius hevur verið limur í Javnaðarflokkinum frá ungum av, og hevur hann eisini verið uppstillaður fyri flokkin í Eysturoynni. Hann hevur verið deknur í Leirvíkar Kirkju í 27 ár, eisini er hann virkin í Meinigheitshúsinum í bygdini. Mariusi dámar sera væl at ganga, og gongur hann nógv í fjøllunum. Hann er eisini grindaformaður.

Sylverius hevur opið hús á Skála leygarkvøldið 19. juli, og Marius heldur føðingardagin saman við sínum nærmastu á Muntra í Fuglafirði sunnukvøldið 20. juli.



## Petur Jacobsen 50 ár

10. juli fylti stjórin á útvarpsrásini Rás2, Petur Jacobsen í Søldarfirði, 50 ár. Petur er føddur í Søldarfirði, sonur Inger, f. Rasmussen, og Dávur Jacobsen í Søldarfirði. Sum tvey ára gamal flutti hann saman við foreldrum sínum til Havnar at búgva. Í 1959 fluttu tey til Klaksvíkar, tá pápin, Dávur Jacobsen, sum var byggimeistari, var við til at byggja Klaksvíkar Sjúkrahús. Sum 14 ára gamal fór Petur í læru sum bilmekanikari hjá Rósing Rasmussen í Søldarfirði. Hetta var í Í 1967. Hann var onkran túrin til skips meðan hann lærdi. Seinni fekk hann sær egnan lastbil og koyrdi í eini trý ár. Í 1977-78 var hann verkførari á bilverkstaðnum hjá Johannes Berg á Glyvrum. Í 1979 stovnaði hann sína egnu fyritøku í Søldarfirði, Essan, sum var ein verkstaður til umvæling av lastbilum, bussum, gravimaskinum og øðrum tungum akførum. Í 1981 flutti Essan inn í nýggj og størri hølir í Søldarfirði. Tá Petur gavst við Essuni síðst í 80-unum, fekk hann sær egnan dekkverkstað í Søldarfirð og umboðaði amerikansku Goodyear dekkini. Í 1995 stovnaði hann ADJ-Sound, sum tók sær av at útleiga tónleikaútgerð til konsertir og onnur stór tiltøk. Í 1999 stovnaði hann útvarpstøðina Rás2, eftir at útvarpstøðin, Atlantic Radio, var hildin uppat. Rás2 sendi fyrstu ferð 14. desember 1999. Síðan tá hevur Petur saman við familjuni og øðrum starvsfólkum rikið hesa útvarpstøðina við Hoyvíksvegin í Havn. Petur er giftur við Randi, f. Samuelsen, av Tvøroyri. Børnini hjá teimum eru: Anja, Dávur, Jan, Ronny og Ingi.